HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

Vestmanna Kommuna
Bakkavegur 8, Postboks 91
350 Vestmanna

13. oktober 2017
**Mál**: 17/00715-8
**Tygara Skriv**:
**Viðgjørt**: KHP

*Góðkenningarskriv*

## Serstøk byggisamtykt fyri útstykking á Grótbrúgv í Vestmanna

Eftir reglunum í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir hevur Vestmanna kommuna í skrivi, dagfest 17. august 2017, sent Heilsu- og innlendismálaráðnum uppskot til serstaka byggisamtykt fyri útstykking á Grótbrúgv í Vestmanna til góðkenningar.

Uppskotið til serstaka byggisamtykt á Grótbrúgv í Vestmanna hevur ligið alment frammi frá 15. juni til og við 6. juli 2017. Tá freistin at koma við møguligum broytingaruppskoti ella mótmæli var farin, 27. juli 2017, hevði kommunan einki mótmæli ella broytingaruppskot móttikið.

Býarskipanarnevndin hevur havt málið til ummælis og hevur í ummæli sínum, dagfest 26. september 2017, mælt til, at umsóknin verður gingin á møti.

Heilsu- og innlendismálaráðið tekur undir við ummælinum frá Býarskipanarnevndini.

Sagt verður frá, at Heilsu og innlendismálaráðið við heimild í § 4 í býarskipanarlógini góðkennir serstøku byggisamtyktina fyri útstykking á Grótbrúgv í Vestmanna.

Hjálagt serstøk byggisamtykt fyri útstykkiing á Grótbrúgv í Vestmanna við átekning frá Heilsu- og innlendismálaráðnum.

Fyri at eingin ivi skal verða, skulu vit minna á, at hóast ráðið nú hevur góðkent byggisamtyktina eftir reglunum í býarskipanarlógini, so sleppur kommunan ikki undan at fáa til vega møguligar aðrar góðkenningar frá øðrum myndugleikum, t.d. frá friðingarmyndugleikunum, sum arbeiða eftir reglunum í náttúrufriðingarlógini (ll. nr. 48 frá 9. juli 1970).

Vegna Heilsu- og innlendismálaráðið

Hilmar Høgenni
deildarstjóri

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 304025 • E-mail: himr@himr.fo